Götu Kommuna

# Pedagogur søkist

**Pedagogar søkjast til Dagstovnin í Gøtu. Til at byrja 6 august 2007.**

1 Avloysari til arbeiðið í Dagstovninum tá starvsfólk eru sjúk og í feriu. At byrja skjótast tilber.

**Í dagliga arbeiðnum leggja vit m.a. dent á:**
- at børn og starvsfólk trívast og eru í menning.
- at hava gott samstarv við foreldur og starvsfólk.
- at skapa álit og tryggleika, bæði fyri foreldur og børn.
- at virða tað einstaka barni í bólkinum.

**Vit ynskja:**
- at tú hevur góð samstarvsevnir.
- at tú hevur hug og áðræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerðandisdag.
- at vera við til at mynda og menna tað pedagogiska umhvørvi.

Dagstovnurin lat upp 1 februar 2000, og liggur í hugnaligum og barnavinaligum umhvørvi, við Gøtugjógv.

Lønin er sambart sáttmála ímillum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag.

Nærri upplýsing um størvini fáast við at venda sær til Torgerð Hansen leiðara, fartlf. 771008.

Skrivlig umsøkn við avrit av prógv og ummælum skal sendast okkum í seinasta lagi 15 juni 2007 kl.10.00. Bygdaráðið tekur sær rætt til frítt at velja ímillum umsøknirnar ella ongan at seta.

**Dagstovnurin í Gøtu**
postboks 32.
Vaktarhúsvegur 1.
511 Gøtugjógv.

---

Blái Krossur
BLUE CROSS IN FAROE ISLANDS

# Móttøka hjá Bláa Krossi Føroya

Í sambandi við at Jaspur Langgaard er farin frá sum aðalskrivari hjá Bláa Krossi, og at Hjalmar Hansen tekur við starvinum sum nýggjur aðalskrivari, verður skipað fyri almennari móttøku á skrivstovu felagsins, Heiðavegur 6, Runavík

**friggjadagin 25. mai kl. 15.00 - 17.00.**

- har øll eru hjartaliga vælkomin.

Bláí Krossur Føroya

---

## Starvsfólk til:

INTERSPORT

## Tórshavn

**Søkt verður eftir lærlingi til Thomas Dam ítrótt í Tórshavn.**

Starvið fevnir um alt vanligt handilsarbeiði innan sølu av ítróttarútgerð. So ert tú ein m/k, sum hevur áhuga innan hetta økið, kunnu vit bjóða tær eina spennandi lærutíð hjá okkum

Thomas Dam Ítróttur er partur av Intersport- og Sport Direct samtakinum og hava vit 3 ítróttarhandlar. Umframt handilin í Tórshavn hava vit eisini ein á Glyvrum og ein í Klaksvík.

So ert tú ein fryntlig/ ur persónur við áræði og ikki ert bangin fyri at taka eina eyka hond í tá á stendur ert tú vælkomin at søkja hetta lærupláss. Lærutíðin er 2 ár við HH prógvi og 3 ár við FHS prógvi.

Umsóknir við prógvum og viðmælum verða at senda til:

***Thomas Dam Ítróttur***
***Niels Finsensgøta 5***
***Boks 268***
***FO-110 Tórshavn***

P/F THOMAS DAM ÍTRÓTTUR
Niels Finsensgøta 5 · boks 268 · FO-110 Tórshavn

---

# Arbeiðsmaður ella handverkari

Søkt verður eftur einum manni til at byrja skjótast til ber.

Starvsøkið er undir arbeiðsformanninum á vegadeildini.

Kommunan roknar við at tygum eru handaligur, tí arbeiðið umfatar eisini røkt o.a. av bygningum kommununnar, og fyrifallandi arbeiði á deildini.

Lønin er sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Skrivlig umsókn skal latast kommununi seinast 31. mai 2007.

**Kvívíkar kommuna**
Víkarvegur 4 · 340 Kvívík · Tlf. 42 12 94 · Fax 42 14 98

---

# Vága RíðingarFelag

Aðalfundur verður í MB húsinum
08.06.07 kl 20:00

**á skránni:**
- Rokniskapur
- Væl av nevnd
- Ymist

*Við Ríðikvøðu*

***Vága RíðingarFelag***

---

*Merlot søkir eftir*



*Tænarum/servitrisum og hjálparkokki*
*at byrja skjótast tilber.*
*Hevur tú hug at arbeiða í einum spennandi, fjølbroyttum og avbjóðandi umhvørvi, er tað júst tær vit hava brúk fyri.*
*Nærri upplýsingar um størvini fáast við at ringja til 214121*

RESTAURANT
MERLOT
Magnus Heinasonargøta 20
FO-100 Tórshavn
Tel (+298) 311121 - Mobile (+298) 214121

Sjónband 317774

---

KVINNUHÚSIÐ
Postsmoga 278 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 317200 · Fax: 313243
post@kvinnuhusid.fo
www.kvinnuhusid.fo

# Námsfrøðingur til Kvinnuhúsið

Søkt verður eftir námsfrøðingi 30 tímar um vikuna. Fremsta uppgávan er at vera um og samskifta við kvinnur og børn, ið gista á Kreppumiðstøðini.

Tann, ið verður settur, skal í samstarvi við leiðaran taka á seg allar uppgávur, sum arbeiðið í Kvinnuhúsinum ber í sær. Arbeiðsuppgávurnar eru spennandi og fjølbroyttar við nógvum avbjóðingum. Arbeiðstíðin er gerandisdagar millum kl. 8 og 17.

Umsøkjarin skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Nærri fæst at vita um starvið við at vena sær til leiðaran í Kvinnuhúsinum.

Starvið verður at seta skjótast gjørligt.

Umsóknarfreistin er 15. juni 2007, og skal umsóknin sendast til Kvinnuhúsið, postrúm 278, 110 Tórshavn.

---

# Lærlingar

Vit søknast eftir lærlingum til rørsmíð at byrja sum skjótast.

**Hógv Handilsvirki**
**Oman á Sand 15 · FO-660 Søldarfjørður**
**Tel 470 400 · Fax 470 401 · hogv@hogv.fo**